# Krabbameinsútgreining
# Illgruni um krabba í ytru kvinnuligu kynsgøgnum

## Sjúkueyðkenni, ið geva illgruna um krabba í ytru kvinnuligu kynsgøgnum

Um nevndu sjúkueyðkenni eru tilstaðar hjá kvinnu í ytru kynsgøgnum

- Áhaldandi
  * Skriði
  * Svíðandi kensla
  * Sár
  * Trot
  * Ífylla (tumordannelse)

Skal fremjast

- Undirlívskanning við smear
  * Um onnur greið orsøk enn krabbi ikki verður staðfest, skal ávísast til krabbameinsútgreining
  Spyrja um royking
  Sjúkrasøgu viðv. Lichen Sclerosus

## Handfaring av recidiv

- Í uppfylgingartíðarskeiðnum: Ávísing sendast til gynekologiskt ambulatorium
- Eftir uppfylgingartíðarskeiðið: Nýggj ávísing sendast til krabbameinsútgreining

## Ávísingin

Útfyll vinarliga ávísingarfrymilin "Illgruni um krabba í ytru kvinnuligu kynsgøgnum" undir móttakandi eindini "Krabbaútgreining" í Cosmic. Lýs støðuna undir aktuelt - íroknað nær sjúkutekini eru íkomin v.m. Hvussu er almennstøðan. Orða vinarliga ávísingina so neyvt, at tað er lætt hjá serøkinum at visitera og bíleggja viðkomandi kanningar, so útgreiningartilgongdin verður so skynsom sum gjørligt.

Útgáva januar 2026